Kommunufelagið

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
100 Tórshavn

29. januar 2019

Okkara j.nr.
19/00181-4

Málsviðgeri
Jóhan Lamhauge

Tygara j.nr.
18/00383

**Viðv.: uppskoti til løgtingslóg um savnsvirksemi landsins (savnslógin)**

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerkingum til uppskot til løgtingslóg um savnsvirksemi landsins, ið er sent felagnum til hoyringar.

Sambært innihaldinum fevnir lógin bert um savnsvirksemi hjá landinum innan mentanarsøgu, náttúrusøgu og list.

Kommunufelagið hevur ikki viðmerkingar til sjálvt innihaldið í lógartekstinum, annað enn til § 9. Í § 9 er ásett, at landsstýrismaðurin tilnevnir eitt savnráð. Onki er ásett í lógartekstinum um, hvussu savnsráðið verður sett saman, men í stk. 3 er heimilað landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um savnsráðið, harundir uppgávur, tal av limum og hvussu ráðið er sett saman.

Kommunufelagið hevur ta generellu støðu, at valdsbýtið millum løgting og landsstýrið skal virðast, soleiðis at løgtingið lóggevur og landsstýrið umsitur lóggávuna. Løgtingið skal tí so vítt gjørligt lóggeva so neyvt sum til ber, og heimildir til landsstýrið at áseta neyvari reglur skulu avmarkast til møgulig ítøkilig viðurskifti av ávísum tekniskum ella fakligum slagi, ið javnan broytast ella skulu dagførast.

Í aðrari lóggávu, t.d. bæði í fólkaskúlalógini og dagstovnalógini eru ráðgevandi ráð sett, har bæði uppgávur, tal av limum og samanseting av ráðnum er beinleiðis ásett í lógina. Í viðmerkingunum til § 9 í uppskotinum til savnslóg sæst, at Mentamálaráðið longu hevur umhugsað bæði uppgávur og samanseting av ráðnum, so tí mælir Kommunufelagið til, at uppgávur, tal av limum og samanseting av ráðnum verða beinleiðis sett inn í lógina, soleiðis sum gjørt er í nevndu líknandi førum. Kommunufelagið sær tað sum eina sjálvfylgju, at kommunali geirin er umboðaður í hesum ráði.

Hóast sjálvur lógarteksturin ikki leggur upp til, at lógin hevur beinleiðis ávirkan á kommunala geiran sum so, so eru tó greiðar ábendingar í viðmerkingunum um, at kommunali geirin við tíðini fer at vera ávirkaður.

Í dag er eitt ávíst samanfall millum bygdasøvn og viðkomandi landsstovnar, viðvíkjandi hjálp, leiðbeining og stuðli. Somuleiðis verður í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið gjørt væl burturúr at boða frá, at Mentamálaráðið ætlar at dagføra bygdasavnslógina, og í almennu viðmerkingunum á síðu 9 ovast sæst at lesa, at *"Seinni er ætlanin at broyta bygdasavnslógina,*

*so lóggávan eisini fevnir um onnur søvn, eitt nú listasøvn, nátturugripasøvn og at dagføra stuðulsskipanina á økinum."* Á síðu 13 og 14 verður gjørt burturúr at lýsa skipanina við stuðli til bygdasøvn, og greið tekin eru um, at landsstýrið hevur ætlanir við regulering av hesum øki og stuðulsskipanini fyri bygdasøvnini og onnur lokal søvn.

Rætt er, at landssøvnini og lokalu søvnini møguliga tæna ymsum áhugamálum og hava ymisk endamál og tí má komandi lógarbroyting taka hædd fyri hesum. Kommunufelagið tekur fyri givið, at Kommunufelagið hevur ein aktivan leiklut í arbeiðinum at gera broytingar í lóggávu, sum á einhvønn hátt hevur ávirkan á lokalu søvnini.

Kommunufelagið hevur ikki aðrar viðmerkingar til lógaruppskotið um søvn landsins, men sær fram til eitt gevandi samstarv um dagføringina av lóggávuni kring lokalu søvnini.

Vegna Kommunufelagið

Dennis Holm, formaður

Eyðun Christiansen, stjóri

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo